Lívdin
- í lívd hins hægsta

Juli 2007



# Senøva og Dánjal ungdómsleiðarar



Senøva og Dánjal Petersen hava tikið við sum leiðarar av ungdómsarbeiðinum í Lívdini.

„Vit eru sera glað fyri hesa uppgávuna, vit hava fingið, og fyri tey ungu, ið longu eru virkin í arbeiðnum. Framgongdin í ungdómsarbeiðinum er ikki tengd at einum fólki, men at øllum, sum eru við", siga Senøva og Dánjal.

Tey siga, at teirra visiónir í høvuðsheitum eru í tveimum pørtum. „Ungdómsarbeiðið skal røkka bæði inneftir og úteftir. Vit royna at fáa nýggj fólk at koma til ungdómsmøtini, men vit mugu endiliga ikki gloyma tey, ið longu eru trúføst." Fyrst verður arbeitt við „infrastruktinum", og síðan verður hugt meira úteftir.

Senøva er úr Sandavági og hevur gingið á bíbliuskúlanum hjá GLO í Motherwell í Skotlandi. Dánjal er úr Havn. Fyri einum ári síðan gjørdist hann fyrsti føroyingur nakrantíð, sum tók eitt BA Honours prógv í gudfrøði frá Birmingham Christian College í Onglandi. Senøva og Dánjal giftust í fjør og búgva í Sandavági.

Tey, sum vilja gerast partur av ungdómsarbeiðinum í Lívdini, eru meira enn vælkomin at ringja til Dánjal á tlf. 581300.

**Minnist til at siga okkum frá!**

Vit heita á øll í samkomuni at siga okkum frá, um okkurt er, sum tit ynskja at fáa við í faldaran, eitt nú børn, ið verða fødd, brúdleyp, gullbrúdleyp og annað.

Í sambandi við rundar føðingardagar, skriva vit ein stubba um fólk í samkomuni, sum fylla 50, 60, 65, 70, 75, 80, 85 ár o.s.fr.

Teldupostadressan er: faldarin@livdin.fo

## Gud elskar glaðan gevara

Tí Gud elskar glaðan gevara! (2. Kor. 9,7). Síðan Lívdin byrjaði sítt andaliga virki fyri skjótt seks árum síðan, hava fíggjarligu viðurskiftini í samkomuni verið umsitin eftir sama fíggjarliga leisti, tó við nøkrum heilt smáum broytingum. Skipanin er tann, at av øllum innkomnum gávum til raksturin verða útreiðslurnar fyrst drignar frá, og síðan verður restin býtt eftir einum býtislykli til fulltíðartænarar, trúboðarar, byggigrunn og trygdargrunn.

Fyrsta sunnudag í hvørjum mánaði verður savnað inn til byggigrunn og hinar sunnudagarnar til samkomurakstur.

Tað er fantastiskt at uppliva tann offurvilja, ið fólk vísa við føstum regluligum flytingum hvønn mánað, bæði til samkomurakstur og byggigrunn.

Samkoman er vaksin munandi og somuleiðis eisini fíggjarligu tørvirnir. Stórur dentur hevur verið lagdur á at savna inn til komandi bygning okkara, sum eisini er neyðugt, men í øllum hesum mugu vit ikki gloyma tey, ið tæna fulla tíð, og trúboðarar okkara, ið vit sum samkoma hava sent út og eisini hava fíggjarliga ábyrgd av.



*Jákup Jacobsen*

Við hesum í huga hevur leiðslan í samkomuni, tó uttan luttøku av Jógvani, gjørt av at endurskoða fíggjarligu vegleiðingina við størri denti á tey, sum tæna í samkomuni og úti á akrinum. Gávur til rakstur verða eisini framyvir býttar eftir einum føstum leisti, fyrst og fremst til fulltíðartænarar í samkomuni og til trúboðarar, síðani til útreiðslur av samkomurakstri og trygdargrunn. Gávur til byggigrunn fara óskerdar til ætlaða bygningin.

Hjartans tøkk fyri gávumildni tykkara. Harrin skal løna einum og hvørjum. „Tað sum tit hava gjørt einum av hesum minstu brøðrum Mínum, tað hava tit gjørt mær!“ Matt. 25,40

# Vinir í Lívdini



## Tillukku við føðingardegnum

**Hans Vilhelm Danielsen 60 ár**

Leygardagin 9. juni fylti Hans Vilhelm Danielsen 60 ár. Hans Vilhelm er ættaður av Húsum, men flutti til Klaksvíkar fyrst í 1960 árunum, har hann fór í snikkaralæru. Størsta partin av sínum arbeiðslívi hevur hann siglt við langfaratrolarum og við Ennibergi síðan seinast í 1980 árunum. Hans Vilhelm er giftur Elmu Berg úr Søldarfirði, og tey búgva í Hoyvík. Vit ynskja Hans Vilhelm tillukku við føðingardegnum.

**Mervin Egholm 50 ár**



Fríggjadagin 1. juni fylti Mervin Egholm í Hoyvík 50 ár. Mervin er ættaður úr Streymnesi og er útbúgvin maskinsmiður og maskinistur. Hann hevur verið sjómaður, men er nú lagstur uppi og farin at arbeiða í landi. Vit ynskja Mervin tillukku við føðingardegnum.



## Tillukku við barninum

9. juni fingu Kristina Matras Jensen og Jákup Jensen í Havn eina dóttir. Hon var 50 cm long og vigaði 3.100 gr.

## TILTØK Á BREKKU 3

(bygningurin aftan fyri MBM)

Eingin undirvísing og bønarskúli týskvøld (summarsteðgur)



*Á Brekku 3*

## Føðingardagur og móttøka

Fríggjadagin 15. juni var móttøka í Pálsstovu í Mykinesgøtu í sambandi við, at samkomuleiðari okkara Jógvan Zachariassen fylti 40 ár, og bókin „SAMKOMAN – innlit í samkomu Kristusar og samkomulív í 21. øld", sum Jógvan hevur skrivað, varð løgd fram.

Tað er forlagið Leirkerið í Gøtu, sum gevur bókina út. Bókin er 400 blaðsíður og er til keyps í bókahandlum kring landið. Bókin kann eisini keypast undir møtunum í Lívdini sunnudag fyri 300 krónur.



*Feðgarnir Zacharias og Jógvan Zachariassen. Zacharias handar vegna forlagið Leirkerið Jógvani bókina.*

## Summarsteðgur

*Eins og undanfarin ár fara vit aftur í summar at hava ein summarsteðg í Lívdini:*

Seinasta tiltakið á Brekku áðrenn summarsteðgin var týskvøldið 19. juni. Byrjað verður aftur 21. august.

Sunnudagarnar 22. juli, 29. juli og 5. august eru eingi møtir í Hoyvíkar skúla.

Byrjað verður aftur sunnudagin 12. august. Næsti faldarin verður: September 2007.



## Ungdómsmøtini saman við Ebenezer

Ungdómsmøtini í Lívdini, sum vanliga eru fríggjakvøld, verða í summar hildin saman við Ebenezer. Byrjað verður leygarkvøldið 7. juli og síðan hvørt leygarkvøld til 11. august. Ólavsøkan fellur eisini á ein leygardag, og væntandi verður okkurt gjørt saman við teimum tá eisini. Byrjað verður aftur í Hoyvíkar skúla fríggjakvøldið 17. august.

## Gloymdir lutir

Tá vit rigga av eftir møtini sunnudag, kemur tað javnan fyri, at ymsir lutir liggja eftir. Tað kunnu vera klædnalutir hjá bæði børnum og vaksnum, prýðislutir, Bíbliur o.s.fr.

Higartil hava vit ikki havt nakað fast pláss til hesar lutir, men nú hava vit fingið okkum ein væl avmerktan plastikkassa, sum fer at standa við borðið í gongini, har slíkir lutir skulu leggjast í.

Tey, sum finna gloymdar lutir, verða biðin um at leggja teir í kassan, og tey, sum hava mist okkurt, kunnu leita í kassanum.





*Her tulkar Bjørg fyri trimum deyvum: Brian úr Maleisia og systkjunum Hans og Meifríð Hansen úr Havn*

## Deyvatulking
## – ein tænasta í Lívdini

Sum tey flestu hava givið gætur, hava vit í fleiri sunnudagar havt tulking fyri teimum deyvu, sum koma til møtini í Lívdini.

Tað er Bjørg Hjelm, sum tulkar fyri teimum deyvu. Bjørg, sum er úr Havn, er útbúgvin sosialráðgevi og hevur gingið á teknmálsskúla í Keypmannahavn og Århus.

Dagliga arbeiðir hon sum deyvaráðgevi hjá Deyvafelagi Føroya.

Bjørg sigur, at um tað eru deyv, sum vilja, at tulkað verður fyri teimum í Lívdini, eru tey ella teirra avvarðandi vælkomin at seta seg í samband við hana á telefon 22 44 32.

# Skráin fyri møtini í Hoyvíkar skúla







(Seinna møtið er styttri enn vanligt (45 min.)

### Sunnudagin 1. juli

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Troyst.*
*Talari: Ólavur Jøkladal.*
Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Tilbiðjan.*

### Sunnudagin 8. juli

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Opið evni.*
*Talari: Jógvan Júst Rasmussen.*
Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Tilbiðjan.*

### Sunnudagin 15. juli

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Opið evni.*
*Talari: Símun Absalonsen.*
Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Tilbiðjan.*

### Sunnudagin 22. juli

(summarsteðgur)

### Sunnudagin 29. juli

(summarsteðgur)

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni.*

*Útgevari: Samkoman Lívdin – www.livdin.fo · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson · Teldupostur: faldarin@livdin.fo*